# Við Farmaleiðum í Sandoynni




*Her verður tann seinasta vøran á hesum túrinum latin til handilin Mølina í Skálavík. So er klárt at byrja nýggjan túr*

**So hvørt sum samferðslukervið verður útbygt, verður alt meira av frakt flutt við flutningsbilum kring landið. Vit fylgdu bilinum hjá Farmaleiðum í Sandoynni seinasta hósdag.**

FARMALEIÐIR
*Magnus Gunnarsson*

Flutningsbilarnir hjá tí almenna, Postverkinum og Farmaleiðum, hava ofta verið orsøk til orðaskifti, bæði á tingi og í fjølmiðlunum. Onkur heldur at hesir bilar koyra hálvtómir aftaná hvørjum øðrum, og at ruturnar kundu verið samanlagdar. Onnur halda tað mótsatta, at hesar ruturnar als ikki kunnu sameinast. Vit fylgdu bilinum hjá Farmaleiðum í Sandoynni seinasta hósdag. Bilførari var Sunleiv Djurhuus.

Arbeiðsdagurin hjá Sunleivi Djurhuus, sum býr í Skálavík, byrjar við at hann fer upp klokkan 5.00 um morgunin. Hann má fara tíðliga frá húsum, um hann skal náa at heinta fisk frá flakavirkjunum á Sandi ella í Skopun, áðrenn Teistin fer av Skopun kl. 6.30. Hann er á Gomlurætt kl 7.15 og koyrir beinleiðis til Skipafelagið Føroyar á Eystaru Bryggju við fiskinum. Um hann hevur koyrt saltfisk, má hann vaska og turka lastina, áðrenn hann kann lessa bilin aftur á pakkhúsinum hjá Farmaleiðum í Havn.

### Fleiri ferðir í Havn

Tá bilurin er lessaður og klárur til næsta túr, gongur leiðin aftur til Gomlurætt við fráferð úr Havn kl. 9.00 og Teistin siglir kl 9.45. Komin í land byrjar hann við at koyra vørur út til viðskiftafólk og handlar í Skopun. Síðan verður koyrt til Sands, Húsavíkar, Skálavíkar og til Dals. Kl.14. fer bilurin aftur úr Skopun, antin við fiski úr Sandoynni ella eftir fiski til flakavirkini. Ofta er so nógvur fiskur, at hann má hava ein anhangara afturat bilinum. Sunleiv er heima aftur í Skálavík millum klokkan sjey og átta um kvøldið. Tað sum bilurin koyrir við, er fiskur fyri flakvirkini, vørur til handlarnar í oynni og ymiskar aðrar vørur til privatfólk og fyritøkur. Fólk kunnu altíð ringja til Sunleiv og gera avtalur við hann um flutning. Sum nú er hava Farmaleiðir 25 flutningsakfør, sum koyra kring alt landið. Teir tillaga seg alla tíðina eftir, hvussu flutningsmynstrið broytist í landinum.




*Her kemur bilurin hjá Farmaleiðum í land av Teistanum í Skopun. Bilurin koyrir fleiri túrar millum Havnina og Sandoynna um dagin*



*Her er Sunleiv inni í matvøruhandlinum Eldhús á Sandi. Teir eru sera væl nøgdir við tænastuna hjá Farmaleiðum. Á myndini er eisini Carl Johan Petersen stjóri í Eldhús*

## Grønland skal spara

Ein nýggj búskaparfrágreiðing, sum grønlendska heimastýrið legði fram í fyrradagin, vísir, at heimastýrið noyðist at skerja almennu útreiðslurnar.

Í frágreiðingini sæst, at inntøkurnar hjá landskassanum fara at minka einar 200 milliónir krónur næstu árini. Landsstýrissamgongan sigur, at við hesum útliti er neyðugt at skerja rakstrarútreiðslurnar hjá heimastýrinum eins og rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum.

Per Skaaning úr demokratiska flokkinum sigur við útvarið í Nuuk, at landsstýrið eigur at geva kommununum boð um at spara. Vilja tær ikki tað, eiga tær at verða lagdar saman, heldur hann.

Per Skaaning sigur við grønlendska útvarpið, at við hesari búskapargongdini verður eisini neyðugt at skerja almenna stuðulin til vinnulívið, sum er um 600 milliónir krónur um árið. Per Skaaning sigur, at meginparturin av stuðlinum til vinnulívið fer til at halda lív í nøkrum vinnugreinum, meðan einki verður brúkt til at menna vinnuna. Tí heldur hann, at stuðulin eigur at verða skerdur.

Í vikuni legði formansskapurin í Landstinginum eitt uppskot fram um at hækka lønirnar hjá landstingsmonnum og landsstýrismonnum. Eftir uppskotinum skulu tinglimirnir fáa 350.000 krónur í løn um árið, meðan lønin hjá landsstýrismonnunum verður næstan 800.000 krónur um árið.

At formansskapurin ætlar at hækka lønirnar, samstundis sum búskaparfrágreiðingin vísir minkandi inntøku, er fallið mongum fyri bróstið. Lønarhækkingin hjá ting- og landsstýrismonnum fer at kosta landskassanum sjey milliónir krónur árliga.

## Svika við toski

Svensku myndugleikarnir hava leingi verið greiðir yvir, at fiskimenn og fiskakeyparar snýta við toski, soleiðis at toskur, sum er veiddur í Eystrasalti, verður uppgivin, sum er hann veiddur í Norðsjónum.

Nú vísir tað seg, at hetta svikið er nógv meiri umfatandi, enn myndugleikarnir hava hildið. Í einari sjónvarpssending í gjár varð avdúkað, at av 39 pakkum við toskaflaki, sum vórðu tiknir í kølidiskum í ymsum handlum, stavaðu 18 úr Norðsjónum, hóast upplýsingarnar á pakkunum søgdu, at fiskurin var úr Eystrasalti. Hetta varð staðfest við at DNA-kanna flakið.

Tað er ikki bert sviar, sum fiska tosk ólógliga í Eystrasalti. Í vikuni tók svenska sjóverjan tvey skip úr Letlandi, sum fiskaðu tosk nakað eystan fyri Bornholm.

## Skotar høggja upp

Skotskir reiðarar, sum hava skip, ið fiska hvítan fisk, kunnu nú søkja um upphøggingarstuðul.

ES-londini samdust fyri trimum mánaðum síðani um at skerja veiðitrýstið munandi. Talan er serliga um toskastovnin í Norðsjónum, og skotsku myndugleikarnir hava sett sær fyri at skerja veiðitrýstið har millum 15 og 20 prosent.

Í 2001 varð umleið 15 prosent av skotska fiskiflotanum, sum fiskar hvítan fisk, høgdur upp. Umleið 100 størri og smærri før vórðu høgd upp, og hetta kostaði tí almenna einar 280 milliónir krónur í upphøggingarstuðuli.

Hesaferð eru einar 450 milliónir krónur settar av til upphøggingarstuðul, og skotsku reiðararnir hava fingið freist til tann 14. august at søkja um stuðul, skrivar The Shetland News.

## Kappaðu fiskin av

Norska fiskiveiðieftirlitið hevur meldað ein verksmiðjutrolara úr Aalesund fyri brot á veiðireglurnar.

Tá menn frá eftirlitinum komu umborð á trolaran, vísti tað seg, at menninir høvdu kappað nógvan fisk av, og kanningarnar vístu, at tann aftari helmingurin varð nýttur til flak, meðan tann fremri helmingurin varð tveittur útaftur. Á tann hátt gjørdist kvotan hjá trolaranum drúgvari. Tað vísti seg eisini, at uppgerðin í dagbókini hjá skipinum var ikki í samsvari við ta veruligu veiðina.

Veiðieftirlitið hevur nú meldað trolaran til løgregluna. Í ákæruritinum stendur, at trolarin hevði tveitt 24 tons av toski og 240 tons av upsa aftur í havið. Virðið er uppgjørt til umleið hálva aðru millión krónur.

Løgreglan í Aalesund kannar nú málið.

## Einki mótvalevni

Nú er greitt, at danska fiskimannafelagið fær nýggjan formann á aðalfundinum í næsta mánað.

Verandi formaðurin, Bent Rulle, hevur boðað frá, at hann stillar ikki uppaftur. Ta avgerðina hevur hann tikið, eftir at fleiri lokalfeløg hóttu við at taka seg úr landsfelagnum, varð bent Rulle afturvaldur. Fiskimenninir eru sera misnøgdir við Bent Rulle, tí teir halda, at hann er alt ov skjótur at góðtaka boð frá donsku og ES-myndugleikunum.

Bara eitt formansevni er til aðalfundin. Tað er Thorkild Førby úr Hanstholm.